# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Avloysari fyri leiðandi ergoterapeut

Ergoterapiin søkir eftir avloysara fyri leiðandi ergoterapeut. Starvið er frá 1. juli 2008 ella skjótast gjørligt fram til 31. mai 2009.

Vit bjóða tær eitt arbeiðspláss í stórari menning, har tú fært møguleika fyri fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Um Ergoterapiina:**
Vit hava tvey høvðusøki, sum fevna um somatiska og psykiatriska viðgerð við felags leiðara, sum hevur sína dagligu arbeiðsgongd á somatiska økinum.

Í løtuni virka 7 ergoterapeutar: 3 ergoterapeutar innan tað somatiska økið, íroknað leiðandi ergoterapeut og 4 ergoterapeutar innan tað psykiatriska økið, íroknað ein deildarergoterapeut.

**Um arbeiðið:**
Vit viðgera í høvðusheitum neurologiskar og kirurgiskar sjúklingar, umframt ambulantar sjúklingar. Vit arbeiða sentralt í Ergoterapiini. Vit nýta m.a. eina kanadiska fyrimynd sum fatanargrundarlag, og arbeitt verður við dokumentatión.

**Arbeiðsøkið**
- skal arbeiða undir leiðslu av Medisinska deplinum
- skal taka sær av fyrisitingarligu leiðsluni
- skal samskipa tær ergoterapeutisku arbeiðsuppgávurnar á somatiska økinum
- skal halda seg kunnaðan við arbeiðinum á psykiatriska økinum
- skal luttaka í ein ávísan mun í viðgerðini á somatiska økinum
- skal halda seg kunnaðan við menningina innan ergoterapi
- skal rágeva og vegleiða starvsfólkunum

**Leiðandi ergoterapeuturin**
Skal vera áhugaður í at luttaka í einari spennandi avbjóðing, kunna vísa áræði, vera opin fyri nýggjum tiltøkum og vilja verða við til at útbyggja tað tvørfakliga samstarvið við aðrar fakbólkar. Vit leggja dent á persónligar eginleikar so sum fleksibilitet, greiða talu og humor.

**Nærri fæst at vita** um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a. við at venda sær til Súnu Mørk, virkandi leiðandi ergoterapeut, tlf. 304500, lokal 5785 og 5786 ella til Biritu Petersen, deildarergoterapeut, lokal 5781.

**Umsóknarfreistin er 19. mai 2008 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Summarfrítíðaravloysarar**
Umsóknarfreistin er 6. mai 2008
kl. 12.00

**Avloysari til Sjúklingaskrivstovuna**
Umsóknarfreistin er 13. mai 2008
kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur sum deildarleiðari til G3**
Umsóknarfreistin er 14. mai 2008
kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B7**
Umsóknarfreistin er 14. mai 2008
kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B6**
Umsóknarfreistin er 14. mai 2008
kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingur til G1 fyrst og fremst til kommunulæknatænastuna (endurlýsing)

Í samband við vaktarskipanina fyri kommunulæknar á Landssjúkrahúsinum, verður søkt eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi á starvsbrøki 0,65 til setan skjótast gjørligt. Arbeiðið er í fyrstu syftu til kommunulæknatænastuna.

**Deildin umfatar**
- vaktarskipan fyri kommunulæknar í tíðarskeiðinum kl. 16.00-08.00 allar dagar umframt dagtímarnar í vikuskiftum
- skaðastovu
- bráðfeingis móttøku
- dagskurð
- viðrakning
- intensiv

Í tíðarskeiðnum frá 16.00-24.00 allar dagar, skal ein sjúkrarøktarøktarfrøðing ur verða knýttur at kommunulæknatænastuni. Í vikuskiftunum verður tað eisini í tíðarskeiðnum 08.00-16.00.

G1 er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, og starvsettu koma eftir tørvi at hava ymiskar arbeiðsuppgávur á deildini, tó fyrst og fremst innan vaktarskipanina fyri kommunulæknar.

Kommunulæknavaktin á Landssjúkrahúsinum hevur nú virkað í eitt ár og umfatar miðstaðarøkið, tvs. Streymoy, Eysturoy, Vágoy, Norðoyggjar, Nólsoy, Hestoy, Koltur, Dímun og Mykines. Seinni verður skipanin møguliga víðkað.

**Arbeiðsøkið í høvuðsheitum**
- Arbeiðsøkið til hesi størv umfatar í høvuðsheitum móttøku, observatión og sjúkrarøkt til sjúklingar, ið seta seg í samband við kommunlæknavaktina, umframt at hjálpa kommunulæknanum við kanning og viðgerð.

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu og upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- gott og positivt arbeiðsumhvørvi

**Krøv til umsøkjarnar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í móttøku, observatión, kanningum, viðgerð og røkt av sjúklingum við bráðfeingis tørvi og minst 2 ára royndir frá medisinskari og/ella kirurgiskari seingjardeild
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og jalig/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- má kunna arbeiða í skiftandi vaktum, tó mest kvøldvaktir og vikuskiftisvaktir
- teldukunnleika á brúkarastøði
- má kunna arbeiða sjálvstøðugt

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- arbeiðsroyndir hjá kommunulækna ella líknandi fakligar breiðar royndir
- fakligar royndir við at móttaka, observera, kanna, viðgerða og røkta sjúklingar við bráðfeingis tørvi

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja 304500 til Margit Stórá, deildarleiðara á G1, lokal 5811, lsmarst@ls.fo ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, lsnaitu@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 16. mai 2008 kl.12.00**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM
- · er sjúklingurin í miðdeplinum
- · eru umleið 200 seingjarpláss
- · eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- · eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- · eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- · er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo